

*Fríðríkur kongur var í 1959 við til víglsuna av minnisvarðanum fyri manningina á Stella Argus. Her leggur hann blómur*

## Leitingin

Sum sagt var skjótt, at skip fóru at leita. Eitt av hesum var Atlantsfarið, har Eiler Jacobsen var skipari. Teir vóru á veg inn við 1000 tunnum, tá ið teir fáa fyrstu tíðindini um, at Stella Argus var saknaður.

Tá ið boðini um at leita koma ger Eiler skjótt av. Royndi skiparin Johan í Hoyvík stóð fyri leitingini, og Eiler minnist eisini, at hann sjálvur saman við Eli Christiansen var við at leggja leitingina til rættis á skrivstovuni hjá Bacalao. Teir sótu við sjókortum og samráddust við skip um, hvar leitast skuldi.

Teir fóru sum skjótast sjálvir út at leita. Teir góvu sær ikki stundir at bíða eftir allari manningini. Tá verða nakrir næmingar av sjómansskúlanum bidnir um at koma við. Ein teirra var Olaf Olsen úr Søldafirði. Leitingin varð løgd soleiðis til rættis, at skipini løgdu seg í eina linju eystur-vestur, og so var miðvíst leitað. Tað var so mikið stutt millum skipini, at tey sóu væl hvørt annað, og tey var nakað at síggja, skuldi okkurt av skipunum rakt við tað.

Leitað var norðuri í 65 stigum, har mett var, at tað var sannlíkast at síggja nakað, um tað fanst. Mest varð leitað í dagslýsi. Tey skip, sum høvdu radara, leitaðu eisini í myrkri. Men tað fanst ikki tað minsta sprek.

Fríggjadagin 2. november kom eisini eitt flogfar úr Danmark at leita.

## Hvat kann vera hent?

Tað vóru gitingar um, hvat ið kann hava verið hent, men niðurstøðan hjá øllum man hava verið, at skipið er koppað so skjótt, at menn ikki fingu møguleika at geva boð frá sær.

Tað er alment kent, at hesir trolarar ofta høvdu trupulleikar við stabiliteti. Tað hevur ikki bøtt um hjá Stella Argus, at einki kol og vatn var í afturskipinum.



*Minnisvarðin, sum varð reistur í 1959, og sum stendur við kirkjuna*

Tað var eisini tann munur á hesum trolarum og sluppunum, at hesar høvdu vanliga egningarskúr. Tí var vandin nógv minni at fáa sjógv inn á dekkið, tá ið tað breyt. Trolararnir høvdu ikki slíka verju, og tí skuldi nógv minni til hjá teimum, áðrenn tað gekk galið.

Eiler roknar við, at Stellan hevur fingið eina fylling inn á síðuna og er koppað í einum broti.

Tann 12. november var sjófrágreiðing í rættinum í Havn, men har kom einki avgerandi nýtt fram.

## Fritiof var sanndroymdur

Tað hava verið nógvar frásagnir um, at fólk hava verið sanndroymd í samband við slíkar hendingar, og tað er eisini dømi um hetta í samband við Stella Argus.

Fritiof Petersen úr Kollafirði var við Stella Argus í fleiri ár fram til 1954. Í 1957 var hann við íslendskum trolara.

Ein dagin fara teir út av Flateyri. Tá greiðir hann stýrimanninum frá, at hann hevði júst hesa somu náttina droymt, at hann var umborð á Stella Argus. Hann droymdi, at teir sigldu undan, og at hann fór fram á dekkið at binda okkurt. Tá rópar Andrass, sum var skipari vanlukkutúrin, á hann um at fara burtur av dekkinum. Her kann skoytast uppí, at júst tað at sigla undan varð roknað sum tað vandamiklasta hjá hesum trolarum.

Dagin eftir sigur stýrimaðurin við Fritiof, at tað var nú merkiligt við hasum dreyminum, tí fjarritarin hevði júst fortalt, at Stella Argus var saknaður!

## Rakti hart í Kvívík

Serliga var smeiturin stórur í Kvívík. Tað fórust 10 mans í sóknini. Tað var serliga ein familja í bygdini, sum varð hart rakt. Tað vóru nevniliga fýra brøður, sum vóru við Stelluni. Teir vóru Andreas, 32 ár, Niels, 29 ár, Ólavur, 21 ár og Tórur Andreassen, sum var 15 ár.

Vit hava hitt eina systir teirra, ta nú nú 84 ára gomlu Jakobu Christiansen, sum býr á Stykkinum.

Pápin Hans Martin sigldi longu undir krígnum sum kyndari við Stellu Argus við Kvívíks Tummas sum skipara.

Har stóð eina ferð á hjá teimum. Teir høvdu saman við Norðbúgvanum verið í Fleetwood á bretsku vesturstrondini og landað, og teir fylgdust heim. Tá verða teir álopnir av týskum flogfari. Seks ferðir fleyg flogfarið yvir Stella Argus, og hvørja ferð slepti tað eini bumbu. Eingin rakti. Samstundis varð skotið, og tá ið teir koma heim taldu teir 162 skothol í skipinum. Norðbúgvin fekk sama umgang.

Men Hans Martin fór í land sjúkur í 1945. Tá gerst kona hansara Marin sjúk. Hon gekk við tí 12 barninum, og hon doyr frá seks synum og fimm døtrum.

Í 1945 fer Andreas hjá Hans Martin, 20 ára gamal, umborð á Stella Argus. Hann var ikki sloppin burtur, meðan kríggið var, so hann hevði róð út heima. Hann var alla sína tíð til skips við Stelluni. Hann hevur kortini verið í landi og tikið skiparaprógv, og nú var hann skipari við sum avloysari fyri tann fasta skiparan Petur Joensen úr Vestmanna, sum hevði frí hendan túrin.

Fyrsti stýrimaður var beiggi hansara Niels, sum gjørdist 29 ár. Hann hevði siglt við Viggo í Skúlanum, pápa John Dam. Síðan hevði hann siglt við trolara vesturi í Vágum. Hann giftist í 1954 við Elisabeth f. Danielsen, sum eisini var úr Kvívík, og tey fingu tvær døtur Maiken og Eydna.

Ólavur var sum ungur farin at læra til elektrikara hjá Frants Petersen inni í Runavík. Frants var giftur við Marnu, sum var systir brøðurnar. Men hann gavst við læruni og fór til skips við beiggjanum.

Tórur var bert 15 ára gamal, og hann var kokkadrongur við. Hann hevði verið við alt árið.

## Seinasta minnið hjá Kobu

Eitt tað seinasta minni Koba hevur um Andreas er, at hann, áðrenn teir fóru seinasta túrin, kom inn at spyrja um tey áttu nakran náta. Jú, tað áttu tey, men Koba helt ikki, at hann var íligin. Tað helt maður hennara ikki mundi bila, so Andreas fekk sín náta. Tað er Koba framvegis fegin um. Hon hevði ikki komið yvir tað, um hon hevði verið orsøkin til, at Andreas ikki fekk hetta sítt síðsta ynski inni hjá teimum uppfylt!

Koba minnist eisini tann sunnudagin, tá ið Stella Argus fór at sigla inn. Tann dagin fekk hon vitjan av sínum systkjum Magnhild og Paula og frá teimum fekk hon at vita, at Stellan var væntað inni dagin eftir. Tað tyktist at vera illsligt veður hendan dagin. Tað var brimgangur, og tey eygleiddu eini hús við flagtaki, har tekjan hevði hug at lyfta seg upp frá.

Týsdagin fer pápin burtur í haga, og hann kemur inn á gólvið hjá Kobu. Hann fær sær ein drekkamunn og fer avstað aftur beint áðrenn útvarpstíðindini á middegi. Tá hoyrist í útvarpinum, at Stellan er ikki framkomin sum væntað. Soleiðis frættu tey flestu um støðuna.

Pápin kemur aftur úr haganum og veit av ongum. Hann hittir menn í túninum í Kvívík, og teir skilja, at Hans Martin einki veit. Tá tekur ein maður hann til síðis, og greiðir frá, hvussu støðan er.

Síðan komu nakrir dagar við eini ræðuligari óvissu, sum so aftur varð avloyst av eini eins ræðuligari vissu.

Fýra brøður og synir, umframt allar hinar umborð vóru burtur. Hetta var ringt at trúgva. Sum vanligt er í eini slíkari støðu verður roynt at finna okkurt



*Guttorm Zachariassen misti pápa sín við Stelluni, og hann greiðir frá í greinini, hvussu hann minnist hetta*

hálmstrá av vón. Pápin hevði ta vón, at skipið var tikið av russarum, og at manningin í hvussu er var á lívi. Hetta var eisini galdandi fyri onnur av teimum nærmastu. Tey kundu leingi yvirhøvur ikki góðtaka, at ein teirra var farin med alla.

Koba og tey kendu eisini ein stóran part av manningi. Tað vóru átta kvívíkingar við. Men úr Norðstreymoy vóru teir 12. Ein var úr Leynum, ein av Válinum og fýra vóru úr Vestmanna. Hetta var alt fólk sum kendist, og nógvir vóru jú kammeratar hjá beiggjunum og plagdu at koma inn á gólvið. Tað var púra óveruligt, at allir hesir nú vóru burtur.

## Vuksu upp uttan pápa

Maiken, dóttir Niels var 2 ára gomul, tá ið hetta hendi, so hon minnist sum so einki. Men hon og systir hennara komu so at vaksa upp uttan ein pápa.

Hon minnist, hvussu væl fólk vóru um hana og systrina, og her var talan um báðar ættir. Mamman, Elisabeth, syrgdi altíð fyri, at tær skuldu fasthalda sam-